## Starv í Føroya Skúlabókagrunni

Eitt starv í Føroya Skúlabókagrunni verður lýst til setanar 1. januar 2007 ella so skjótt sum tilber.

Starvið fevnir í høvuðsheitum um praktiskt útgávuvirksemi, ráðgeving og vegleiðing í sambandi við at geva út fjølbroyttar undirvísingarmiðlar til føroyska skúlaverkið. Ein partur av starvinum verður at standa fyri arbeiðinum at útvega tíðarbærar teldutøkar undirvísingarmiðlar. Upplæring kann verða neyðug.

Til starvið krevst útbúgving sum fólkaskúlalærari, í minsta lagi 5 ára undirvísingarroyndir, dyggur fakligur førleiki, hollur kunnleiki í føroyskum og kunnleiki í teld.

Løn og setanartreytir verða eftir sáttmála við Føroya Lærarafelag og við góðkenning Fíggjarmálaráðsins.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum og møguligum viðmælum skal vera Føroya Skúlabókagrunni í hendi ikki seinni enn mikudagin 20. desember 2006. Gjølligari upplýsingar um starvið fáast frá Helenu Dam á Neystabø, á telefon 31 61 00

**Føroya Skúlabókagrunnur**
Lützenstrøð 4
FO-100 Tórshavn

## Frá Havnar Arbeiðsmannafelag

Møgulig uppskot ið ynskjast viðgjørd á aðalfundinum 2007 skulu vera formanninum í hendi áðrenn 1. januar 2007.

Sambært grein 25 í lógum felagsins skulu uppskot til formansvalevni skrivliga vera nevndini í hendi áðrenn 1. januar 2007.

Saman við uppskotinum til formansvalevni skal vera váttan frá viðkomandi, at hann vil lata seg stilla upp, umframt váttan frá 15 stillarum, sum skrivliga vátta, at teir styðja viðkomandi til formansvalevni. Stillararnir skulu uppfylla treytirnar í grein 12 fyri at hava atkvøðurætt.

Dagfestingin og skráin fyri aðalfundin verður lýst seinni.

**Nevndin**

## Íbúð til leigu

Stór íbúð, undir Heygnum, við 2 kømrum, til leigu.
Terassa beint uttanfyri og frítt útsýni yvir Nólsoyarfjørð og Sandágerð.

**Tlf. 217300**




Sosialurin